# Gudrun Joensen læt lív í flogvanlukkuni

Tað var tann 41 ára gamla Gudrun Joensen úr Bø, sum læt lív í flogvanlukkuni í Stord í morgun. Hon hevur flogið við Atlatnsflog síðani mars í 1992

Millum tey fýra, sum doyðu, var onnur av teimum báðum føroysku flogternunum. Tað er tann 41 ára gamla Gudrun Hervør Joensen úr Bø, sum búði í Sandavági og hevur flogið við Atlantsflog síðani mars í 1992. Eftir Gudruna sita maður og tvey børn.

- Vit drýpa høvur í sorg um at hava mist okkara starvsfelaga, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

Hini trý, sum doyðu vóru Martin Charles Evertsen, 51 ára gamal, Jarle Reime, 33 ára gamal og Per Olaf Skjæveland, somuleiðis 33 ára gamal.

Hetta tíðindaskrivið kom frá Atlantic Airways:

- Atlantic Airways boðar frá, at flogternan, sum læt lív í vanlukkuni í Stord í morgun, er tann 41 ára gamla Guðrun Hervør Joensen í Sandavági. Guðrun Hervør Joensen hevur starvast hjá Atlantic Airways síðan mars 1992. Eftir hana sita maður og tvey børn. Vit drýpa høvur í sorg um at hava mist okkara kæra starvsfelaga og hava djúpastu samkenslu við teimum, ið eftir sita.

Tey fýra, sum fórust í vanlukkuni í Stord, verða nú endaliga eyðmerkt, stendur í tíðindaskrivinum.



*Gudrun hevur verið flogterna hjá Atlantsflog síðani 1992*




*Tað var við stórari sorg, at føroyingar og norðmenn kundu staðfesta, at fýra fólk doyðu í flogvanlukkuni í gjár. Ein føroysk kvinna og tríggir norðmenn lótu lív, og í gjárkvøldi komu líkvognar til flogvøllin eftir teimum deyðu*